# Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðrnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, og skattalógina og skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 130 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og økisskrivstovurnar í Norðurøki, Miðøki og Suðurøki halda til í ávikavist Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Norðurøki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 35 starvsfólk.

## Eftirlitsfólk

**Søkt verður eftir eftirlitsfólkum til Toll- og Skattstovu Føroya, Norðurøki, til at byrja 1. mai ella skjótast til ber.**

**Vit vanta at tú**
hevur eina útbúgving frá hægri lærustovni, so sum HA, HD, Cand. Merc. Aud. ella líknandi útbúgving innan rokniskap. Eisini vanta vit, at tú ert arbeiðssamur, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni. Viðkomandi arbeiðsroyndir hava eisini okkara áhuga.

**Uppgávurnar hjá eftirlitsfólkunum verða m.a.:**

- at fremja eftirlit og grannskoðan av skatti, meirvirðisgjaldi og tolli
- at vitja fyritøkur
- at málsviðgera
- at gera váðametingar
- at ummæla kærumál og dómsmál

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert og fakligt mennandi starv við nógvum avbjóðingum. Góðir møguleikar eru eisini fyri eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Setanarøki**
Setanarøkið er Norðurøki, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

**Umsóknir**
Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Elsu Brimvík, deildarleiðara, ella til Ingolf Lamhauge økisstjóra á tlf. 352600.

Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skal vera Toll- og Skattstovu Føroya í hendi í seinasta lagi: **16. apríl 2007.**

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

**Toll- og Skattstova Føroya**
Norðurøki
Postsmoga 2151
FO-165 Argir





## Leys størv

### Hjálparfólk til Dagstovnin Látrið

Søkt verður eftir einum hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum tilmælum skulu vera Dagstovninum Látrið, 270 Nólsoy, í hendi seinast mánadagin 16. apríl 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Lis Nolsø, stovnsleiðara, tlf. 302462.

### Pedagogur til Barnagarðin við Velbastaðvegin

Søkt verður eftir einum pedagogi, til barnagarð, at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 1. mai 2007 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fyribilsstarv fram til 1. mars 2008. Møguleiki er fyri føstum starvi.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum tilmælum skulu vera Barnagarðinum við velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. apríl 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Monu Mohr, stovnsleiðara, tlf. 314373.

### Pedagogur til Býlingshúsið í Maritugøtu

Søkt verður eftir einum pedagogi, til barnagarðsstovu, at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. mai 2007 ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum tilmælum skulu vera Býlingshúsið í Maritugøtu, Maritagøta 50, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 16. apríl 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ingu-Mariu Amandusardóttir, stovnsleiðara tlf. 302400 ella 272929.

### Starvsfólk til Dagstovnin á Hamrinum

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til barnagarð og tveimum pedagogum til vøggustovu at arbeiða 30 tímar um vikuna.

Søkt verður eisini eftir køksfólki at arbeiða 15 tímar um vikuna. Umframt verður søkt eftir sjúkraavloysara at arbeiða, tá ið tørvur er á tí.

Størvini verða sett 6. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Størvini sum pedagogar og sjúkraavloysari verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Starvið sum køksfólk verður sett sambært avtalu við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum tilmælum skulu vera Dagstovninum á Hamrinum, Glyvursvegur, 160 Argir í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. apríl 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Elisabeth Henriksen, stovnsleiðara, tlf. 322003.

### KT-starvsfólk til KT-deildina

Søkt verður eftir KT-starvsfólki til KT-deildina hjá Tórshavnar kommunu.

Vit leggja dent á, at tú er útbúgvin teldustøðingur ella hevur tilsvarandi royndir. At tú hevur royndir innan Microsoft forritini er ein fyrimunur eins og royndir innan tænastuveiting. Tað er neyðugt, at tú hevur koyrikort.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett skjótast til ber sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum tilmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2007, kl 12. Merkið umsóknina „KT-starvsfólk".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Ellingsgaard (*ingi@torshavn.fo*), Kt-leiðara ella Janus Isfeldt, starvsfólkadeildarleiðara, á tlf. 302010.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**



# KOYRIKORT?
## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 4. apríl 2007 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**



Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo